# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fyrsta B36-myndin



*Veit nakar meira at siga um hesa myndina, ið helst er tann fyrsta, ið er tikin av einum B36-liði*

Frá B36 hava vit fingið sendandi niðanfyri standandi mynd, sum helst er tann fyrsta, ið er tikin av nøkrum B36-liði.

Sum so er talan helst ikki eitt lið hjá B36, men heldur av einum liði, harav nakrir eitt ár seinni ella so vóru við til at stovna nú 70 ára gamla felagið.

Myndin er komin til vega úr MB-húsinum, sum hevur móttikið hana úr Kollafirði. Komið varð fram á myndina, og finnarin roknaði við, at hon hoyrdi heima í MB. Bæði tí spælibúnin líkist tann hjá miðvingum, og tí myndin helst er tikin í Miðvági umleið 1935.

Í Miðvági kendust tey tó ikki við spælararnar á myndini, og síðani er komið eftir, at hon helst hoyrir heima í B36.

Spælibúnin, sum spælararnir á myndini eru í, er tann hjá Fram, sum var upprunaligi spírin til B36.

Nøkur av nøvnunum eru menn komnir fram til, og eru teir hesir:

Aftasta rað frá vinstru: Joen Andreas Hansen (Andrias í Sibbanum), Poli Nolsøe, nr. 3 er ókendur, Eivind Mouritsen, Hans Petur Petersen, vanliga nevndur »trykk« tí hann var prentari. Hann flutti seinni til Klaksvíkar.

Miðara rað frá vinstru: Emil Jacobsen (Emil hjá Gøtu-Jákup), Julian Hansen, Poul Hansen (Poul á Verkinum).

Fremsta rað frá vinstru: Tummas Juel Askham (Ullaba), Jóhs. »Lill« Michelsen ella Júst Sivertsen, Anton hjá Lutherusi (pápi Osvald Hansen)

Tað eru Heðin Samuelsen og Annfinn Danielsen, sum hava roynt at leitað fram til nøvnini á spælarunum. Veit nakar meira at siga um forkunnugu myndina, eru hesi vælkomin at seta seg í samband við teirra. Heðin Samuelsen er at hitta á tlf. 213712, og Annfinn Danielsen á tlf. 224124.

## Dagurin í morgin

**Justa.** Deyð umleiðs 300. Halgisøgan sigur, at hon og systirin Rufina beindu fyri skurðgudamyndini Salambo í Sevilla í Spaniu. Tær vórðu báðar píndar og tiknar av døgum.

Navnið merkir *tann rættvísa*

Lesið Sosialin

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu
tá kæra mamma mín

**Jacobina Olsen (Bina)**
Skála

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri blómur, kransar, peningagávur
til Eldrafelagið Kumlá og hjálpsemi.
Takk til tykkum øll, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

**Palli**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sigmund Bech,** Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar sjúkarhúsi sunnudagin 16. juli, 77 ára gamal.
Farið verður úr kapellinum til Tøroyrar kirkju týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13.00.
Tey, ið vilja minnast Sigmund, kunna lata eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini; konta í peningastovninum.

**Jon Gulak Jacobsen,** ættaður úr Hvalba, andaðist á sjúkrahúsinum í Gentofte, sunnudagin 16. juli, 55 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

14 juli andaðist **Tollak Oskarson** 17 ára gamal. Bønarhald verður á kapellinum týsdagin kl. 14. Kistan ferð av Gomlurætt kl. 15.45. Jarðarferðin verður mikudagin úr heiminum á Sandi til Sands kirkju kl. 13.

†

**Jona Eidesgaard**
Tvøroyri

andaðist mánadagin 17. juli, 88 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†



Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og keningum, at elskaði sonur okkara, beiggi, ommu- og abbasonur

**Tollak Oskarson**
av Sandi

andaðist 14. juli, 17 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Oskar, Nanna, Birna og Rói**